Tekniski Skúlin í Tórshavn

Søkt verður eftir verkstaðarassistenti til Smiðju- og hárfriðkanardeildir skúlans.

Umsøkjarar skulu hava sveinabræv sum maskinsmiðir, smiðir ella elektrikari við minst 5 ára starvsroyndum. EDV kunnleiki á brúkarastøði er ein fyrimunur, eins og víðari útbúgving er ein fyrimunur.

Arbeiðið umfatar:
- Umvæling av amboðum og útbúnaði á báðum deildunum
- Innkeyp av tilfari til smiðjudeildina
- Umsita amboð og tilfarsgoymsluna á smiðjudeildini
- Verða lærarum til hjálpar í samb. við undirvísing á smiðjuverkstaðnum.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Handverkarafelag.

Skrivlig umsókn merkt »verkstaðarassistentur« skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. mars 2001.

Starvið verður sett 1. apríl 2001, ella skjótast gjørligt.

Tekniski skúlin í Tórshavn
Marknagilsvegur 75, P.o.b. 239
FO-110 Tórshavn
Teldupostur: tst@tst.fo

Bilur við skaða til sølu

Merki: Suzuki Alto 1.0 H/B
Árg.: 1998
KM.: 20.000

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Heri Weihe, tlf. 345729 – fax nr. 345607
at hitta mánadag–hósdag millum kl. 8^{30}–10^{00}
og fríggjadag millum kl. 8^{30}–16^{00}

Dagrøktarmamma

Dagrøktarskipanin í Sumbiar kommunu søkir eftir einari dagrøktarmammu at arbeiða sum frítíðaravloysara.

Møguligar umsóknir skulu vera bygdarráðnum í hendi áðrenn 25. mars 2001.

Dagrøktarskipanin
970 Sumba
Tlf. 370344 og 373506

Søkt verður eftir
tveimum lærarum til maskindeild skúlans

Maskindeildin:
Størvini eru fulltíðarstørv, sum umfata undirvísing í maskinsmíð við tilhoyrandi ástøðisligum fakum.

Umsøkjarar skulu hava sveinabræv sum maskinsmiður og minst 2 ára starvsroyndir í hesum yrki, á maskinverkstaði ella líknandi arbeiðsplássi eftir lokna lærutíð. Fyrimunur er at hava víðari útbúgving sum maskinmeistari, verkfrøðingur ella aðra viðkomandi útbúgving, men er tó eingin treyt.
Eisini er áhugi fyri CAD/CAM og CNC ein fyrimunur.

Royndartíðin er 2 ár.

Tey, sum sett verða, mugu vera til reiðar at taka lut í pedagogiskum útbúgvingarskeiðum eins og øðrum neyðugum eftirútbúgvingarskeiðum innan fakið.

Starvið verður sett 1. apríl til at byrja beinanvegin.

Lønin verður smb. sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til skúlan á tlf. 311957.

Umsóknin til starvið skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 26. mars 2001. Við umsóknini skal fylgja avrit av prívskjølum og møguligar starvsváttanir. Umsóknin skal merkjast »lærarar til maskindeildina«.

Tekniski skúlin í Tórshavn
Marknagilsvegur 75, P.o.b. 239
FO-110 Tórshavn

Bengt Göransson

Fyrrv. svenskur mentamálaráðharri

Heldur almennan fyrilestur
undir heitinum:

"Bonaðu gólv valdsins og kjallaraskot máttloysisins - hugarensl um korini hjá fólkavaldinum"

Hóskvøldið 15. mars 2001 kl. 19.30

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM

Til limirnar

Aðalfundur Havnar Handverkarafelags verður mikudagin 28. mars kl. 19.00 á Hotel Hafnia.

Skrá samb. § 25 í lógini:
1. Val av orðstýrara
2. Frágreiðing frá farna árinum
3. Roknskapur til góðkenningar
4. Innkomin mál/lógarbroyting
5. Val av nevnd
6. Val av tveimum grannskoðarum
7. Ymiskt

Eftir aðalfundin verður aðalfundur í Pensiónsgrunninum við hesi skrá:

A. Val av orðstýrara
B. Frágreiðing frá nevndini um virki grunnsins í farna ár
C. Framløga og góðkenning av roknskapi og fíggjarstøðu
D. Støða verður tikin til, hvat gerast skal við møguligt avlop ella hall
E. Val av nevndarlimum
F. Val av grannskoðara
G. Møgulig mál frá nevnd/limum

Uppskot til viðtøkubroytingar í lógum Havnar Handverkarafelags:
§ 36 Ásetan av limagjaldi
§ 15 Nevndin/skipan av nevnd

Gjørt verður vart við, at limur má ikki skylda meira enn 12 vikur. Eftir 12. viku detta øll tey rættinbdi burtur, henda lóg gevur, sí §§ 4–6 og 7.

Uppskot til viðtøkubroytingar í Eftirlønargrunni Havnar Handverkarafelags:
§ 4 Medlemskreds
Sum seinasta pkt. í nr. 1: Herudover kan medlemmer i andre foreninger optages såfremt pensionskassens bestyrelse træffer bestemmelse herom.

§ 9 Generalforsamling
Sum nýtt stk. 3: Enhver ordinær ella ekstraordinær generalforsamling indkaldes af bestyrelsen med mindst 2 og højst 4 ugers varsel ved offentlig meddelelse samt skriftligt til de medlemmer, der ønsker det.

Møtið fjølment.

Havnar Handverkarafelag

Ársaðalfundurin

verður í ÍSF húsinum í Havn leygardagin 21. apríl kl. 10.00

Skrá sambært lógini:
1) Val av orðstýrara
2) Formansfrágreiðingin
3) Framløga av roknskapi
4) Innkomin mál
5) Val av nevndum og eykamonnum
6) Ymiskt

Uppskot um lóg og lógarbroytingar skulu vera starvsnevndini í hendi í seinasta lagi 14 dagar undan aðalfundinum

Hondbóltsamband Føroya

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

MOTORUR
ynskist til ein Mazda E 2200 buss, árg. 1988.
Tlf. 214505

EYKALUTIR
til Subaru 1.8 4 WD st. car '86 til sølu.
Tlf. 449045 ella 283753 eftir kl. 17

KRANI TIL SØLU
Ferrari GR 2300 S krani til sølu.
Tlf. 449045 ella 283753 eftir kl. 17

BILUR TIL SØLU
Kia Sephia, árg. 6/98, 18.000 km, sær sera gott út, til sølu.
Tlf. 313865

TOYOTA COROLLA 1.3
árg. 89, 92.000 km, nýsýnaður, til sølu.
Tlf. 319927

VW GOLF TIL SØLU
Ein VW Golf 1600, árg. 1988 fyri 10.000 kr. til sølu, 2 sett av felgum (eitt sett við summardekk og eitt við píkadekkum) fylgja við.
Tlf. 310702

OPEL ASCONA 2000i
koyrt 120.000 km, sýnaður í des., 10.000 kr.
Tlf. 444679

EYKALUTIR
til Mazda 323 til sølu, árg 85/88
Tlf. 250740 best eftir kl.16:30

SPORTFELGUR
4 sportsfelgur 16" til Honda Accord til sølu fyri kr. 3000.-. Felgurnar eru 1 1/2 ára gamlar, síggja gott út, men dekkini eru ílla slitin.
Tlf. 212377

BILUR TIL SØLU
Hyundai Accent 17 mánaðar gamal, koyrt 18.153 km til sølu.
Tlf. 371243 - 220482

FORD MONDEO
Turbo diesel, árg. 12/98, við tryggingarskaða, til sølu. Koyrt 26.000 km.
Tlf. 314159 ella 219600

NISSAN PATROL
árg. 89, til sølu. Tlf. 212789

YNSKIST
Er tað nakar sum hevur eitt útstoyt til SAAB 90 árg. 1985 til sølu ella vil sleppa av við tað á sera bíligan hátt, sig mær frá á telefon 317362

Lýsingartekstur

_____

_____

_____

_____

_____

_____

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Bræveskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12^{00}, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

DIESEL BILUR
VW Passat, árg. 86, bíliga til sølu. Krevur ábøtur.
Tlf. 214005

SUMMARDEKK TIL SØLU
4 Bridgestone RE 720 195/55x15 og 4 Continental 195/65x15. Lítið brúkt.
Tlf. 250855

OPEL KADETT 1,3
Árg. 87, 85.000 km, bert ein eigara, koyrir væl, góð dekk, sýnaður í juli 2000. Kostnaður 6.000 kr.
Tlf. 316085 - 217240

FIAT TIPO 1.4 DGT
árg. 88 í góðum standi, sýnaður í juli 2000.
Tlf. 424033 ella 220125

DAIHATSU CHARMANT
árg. 87, nýlakeraður, silvurgráur er bíliga til sølu við skaða framman (kann ikki koyra). Aðrir eykalutir fylgja eisini við.
Tlf. 372333

TOYOTA CARINA E 2.0
diesel árg. 1996, 128.000 km, í góðum standi til sølu.
Tlf. 422435 ella 253550

VW GOLF 1.8 GTI
árg. 87, 131.000 km, nýsýnaður, nýlakeraður, í sera góðum standi og sær gott út innan og uttan.
Tlf. 317490 ella 251337

OPEL KADETT
vøruvognur, árg. 89, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 211643 og 421643

SAAB 900 A
Árg. 86, í góðum standi, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 214568 og 313272

EYKALUTIR
til Mazda 323,árg 84/89 til sølu.
Tlf. 250740, best eftir kl.16.30

EYKALUTIR
til Mazda 323,árg 84/89 til sølu.
Tlf. 250740, best eftir kl.16.30

TIL SØLU
Brenstoffspumpa diesel og synamo til Daihatsu Charade G100.
Tlf. 282625

MAZDA 929
Hardtop 2.0 árg. 1984, sýnaður 2/3-2001, ongan kross. Til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 222980 ella 441515

MITSUBISHI COLT
Árg. 86, er innkallaður til sýn, defektan gearkassa, men motorur góður. Kr 2.00.
Tlf. 216409

Amboð

TIL SØLU
Brúkt Atlas Copco Cobra, sum borar & brekkar, til sølu.
Tlf. 212600

Arbeiði

MÁLARAARBEIÐI
Biðið verður um tilboð uppá tapetsering og máling av stovu.
Tlf. 317506, best millum kl. 8-16

ARBEIÐI SØKIST
Eg eri ein 13 ára gomul genta, ið søki arbeið í Klaksvík. Mær dámar væl at ansa eftir børnum og gera reint.
Tlf. 457722, Jóhanna

HEY!
15 ára gamal drongur søkir arbeiði í frítíðini - havi arbeiðsroyndir.
Jákup tlf. 316606

HEY!
Eg eri 15 ár og vil fegin hava arbeiði aftaná skúlatíð - havi arbeiðsroyndir.
Jákup - tlf.316606

ARBEIÐI YNSKIST
16 ára gomul genta søkir arbeiði eftir skúlatíð. Helst í Søldarfirði, Runavík ella Toftum. Tími alt arbeiði. Helst at ansa eftir børnum.
Tlf. 441142 ella 250762 eftir kl. 15, Laila

MAÐUR YNSKIR KJANS
sum avloysari við snellubáti, helst úr Klaksvík.
Tlf. 223282

MAYDAY!
Álítandi genta søkir arbeiði eftir vanliga arbeiðstíð í Tórshavn skjótast tilber.
Tlf. 217686

Barnaansing

21 ÁRA GOMUL
genta ynskir at ansa barn/børnum, eg eri sera góð við børn.
Vinarliga ring 332688

ER TAÐ NAKAR,
ið kann ansa lítlu Mariu, ið er 6 mór. gomul, frá kl. 8-15 hvønn gerandisdag, frá hálvum mars.
Ring á tlf. 312358

Barnaútgerð

SEYÐASKINNSPOSI
við reyðum floyalsbetrekki til vogn/koyristól, til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 220772 eftir kr. 17

BILBARNASTÓLUR
ynskist bíliga til keyps. uml. 8-15 kg.
Tlf. 321165

Bátaútgerð

UMSTÝRING
Ein elektrisk umstýring, verður brúkt til ein 30 hesta Saab motor.
Tlf. 423002

FRAMBYGDUR
seksaringur til sølu. Útgjørdur við radara, ekkolodd, VHF, línuspæl, bekkaróður, yvirlivilsisdraktir, motorur 52 HK Deutch. Prísur 40.000 kr.
Tlf. 441741

Bingo

VÁGS PENSIONISTAFELAG
hevur bingo leygardagin 17. mars í Framtíðini. Annaðhvørt bingo 200 kr. høvuðsvinningar 2 gávukort á 500 kr. + eykaspæl.
Nevndin

GOTT BINGO
verður í Framtíðini 29.3. kl. 19.30. Á lutaseðli: páskaregg.
Vágs Svimjifelag

GOTT BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum leygardagin 17. mars kl. 16.00.
Nógv gott at vinna.
Argja Róðrarfelag

GOTT BINGO
verður í TB-húsinum tórsdagin 15. mars kl. 19.00. Hvørt bingo 300 kr. Høvuðsvinningar 2x500 kr. Eykaspæl verður eisini.
Tvøroyrar Bóltfelag

KAGGIN
Gott páskabingo verður 17.3. kl. 15 við barnabingo og kl. 19 fyri vaksin. Vinningar m.a. páskakurvar, før. páskaregg, 15 vinningar á lutaseðli m.a. 2 gávukort á 1.000 kr.
Kaggin

ÍTRÓTTARFELAGIÐ Í FUGLAFIRÐI
hevur basar 24. mars í fimleikarhøll skúlans. Tey, ið vilja stuðla við einumhvørjum, eru vælkomin at venda sær til Andreu, tlf. 444267.
Í.F.

GOTT PÁSKABINGO
verður í Glæmuni í Kvívík Pálmasunnudag 8.apríl kl 19. Nógvir góðir vinningar.Drigi verður í millum spølini um eitt páskaregg.Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Burturm. /funnið

BURTURMIST
Hósdagin misti eg lyklatyssi við 6 lyklum burtur, møguliga á ella omanfyri kajøki í Kollafirði við nýggju bryggjuna. Finningarløn 200 kr.
Tlf. 444744 ella 314744, klaemint@lbf.fo

RUSKINNSTYVLAR
Tú, ið av misgávum tók mínar svørtu ruskinnstyvlar, av merkinum Shoe-Biz, á veitsluni á Landssjúkrahúsinum leygarkvøldið 3.3. verður biðin um at seta teg í samband við tlf. 316587

LYKLARINGUR
við m.a. Ford billykli burturmist við bygdahúsið í Miðvági leygarkvøldið (Prix Føroyar). Finnarin biðist ringja.
Tlf. 211808

EG MISTI
eitt digitalt silvurur á Prix Føroyar í Miðvági, um tú hevur sæð ella hevur tað, so vinarliga ring
tlf. 320773 ella 254086

PRIX FØROYAR MIÐVÁGUR!
Tú, sum fór avstað við mínum leðurjakka, við mappu, pass og visakort í lummanum, vinarliga ring.
Tlf. 333032 ella 253354, Rói

FARTELEFON BURTURMIST
Friggjakvøldið 23. februar misti eg mína fartelefon burtur í Kleopatra. Hon er av slagnum Siemens M35. Tann sum hevur funnið hana verður vinarliga biðin um at bera hana aftur ella ringja til
tlf. 310104/222196

FARTELEFON FUNNIN
á Tinghúsvegnum við Statoil í Gundadali, av slagnum Nokia. Er hon tín…so ring tlf. 316521

Býli

KAMAR Í HORNABØ
Kamar til leigu til gentu í Hornabø. Við atgongd til køk og bað, egna inngongd.
Tlf. 317507

KAMAR TIL LEIGU
Eitt stórt kamar til leigu frá 1. apríl til friðarligt fólk.
Tlf. 316916

MØBLERAÐ ÍBÚÐ
í KBH. verður framleigað í tíðarskeiðnum 15. mars 2001 til 15. juni 2001. Kr. 2100 um mðr. við hita.
Tlf. 315788 ella 316587

VIT ERU
tvey á 25 og 31 ár ið leita eftir íbúð ella stórum kamarið frá 01.07.01. Bæði hava fast starv, fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 251106

KAMAR YNSKIST
til leigu í Havn, helst í økinum Sundvegur/Ternuryggur.
Tlf. 443164

ÍBÚÐ YNSKIST
Íbúð ynskist Friðarligur ungur maður søkir íbúð ella kamar í Havn frá 1. apríl.
Tlf. 216433

BYGDARSTOVAN Í HESTI
verður leigað út. Møguleiki er eisini at svimja.
Tlf. 328035 - 212179

ÍBÚÐ SØKIST
Kvinna við einum barni ynskir íbúð til leigu frá 1. mai ella juni.
Tlf. 315913, Bjørg

ÍBÚÐ YNSKIST
Familja við tveimum børnum søkir íbúð í Tórshavnar kommunu.
Tlf. 315440 ella 210040

KØMUR TIL LEIGU Í HAVN
til fólk, ið ikki roykja og drekka. Atgongd til køk við mest vanligum køksamboðum, bað og vaskimaskinu.
Tlf. 250230

SUMMARHÚS Í NORÐURJYLLANDI
Stutt frá Hirtshals, nær við strond, til leigu. (6 persónar). Nærri fæst at vita við at ringja 004598975460 ella 004521760211

KAMAR YNSKIST
til leigu í Tórshavn.
Tlf. 361452, Antenes Joensen

ÍBÚÐ YNSKIST
í Havn ella nærhendis til tvey aksin og eitt barn frá 1. mai. Má hava 2-3 kømur.
Tlf. 316716

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Tórshavn, max 4.000 kr. um mðr. við el og hita. Gjaldi til tíðina.
Tlf. 361452

KAMAR TIL LEIGU
í Havn, til 1.juli. Áhugað kunnu ringja á tlf. 221636